at skrásetta

Móttikið 29.03.07

Løgmansskrivstovan
30. MAR. 2007
J. nr.: 240-006/07

# Álit

# um

# felags lønar- og starvsfólkafyrsiting

# fyri tað almenna

**28. mars í 2007**

# 1. partur

**1. Inngangur** .......... **2**

**2. Tilmæli** .......... **3**
*2.1 Uppgávur og markamót* .......... *4*
*2.3 Starvsfólkatilfeingi samanlagt* .......... *6*


# 2. partur

**3. Sáttmálasamráðingar** .......... **8**
*3.1 Sáttmálapartarnir í dag* .......... *8*
*3.2 Mál fyri sáttmálasamráðingum* .......... *8*
*3.3 Politiski myndugleikin* .......... *9*
*3.4 Arbeiðsgongdin at gera nýggjan sáttmála* .......... *9*

**4. Starvsfólkamál** .......... **12**
*4.1 Støðan í dag* .......... *12*
*4.2 Mál* .......... *12*
*4.3 Setanarmyndugleiki* .......... *14*

**5. Áseta løn** .......... **15**
*5.1 Støðan í dag* .......... *15*
*5.2 Mál* .......... *15*

**6. Førleikamenning og starvsfólkarøkt** .......... **17**
*6.1 Støðan í dag* .......... *17*
*6.2 Mál* .......... *18*

**7. Lønarstovur og felags lønarskipan** .......... **21**
*7.1 Støðan í dag* .......... *21*
*7.2 Mál* .......... *22*

**8. Tænastumannaeftirlønir** .......... **24**
*8.1 Støðan í dag* .......... *24*
*8.2 Mál* .......... *24*

***Fylgiskjal 1.*** .......... **26**

# 1. Inngangur

Í desember í 2006 avgjørdu aðalstjórarnir, at felags lønar- og starvsfólkafyrisiting skal verða skipað. Landsstýrið hevur eisini tikið undir við tí.

Arbeiðsbólkur varð settur at nærlýsa og útgreina økið. Í arbeiðsbólkinum hava verið ein limur úr hvørjum stjórnarráði, umframt skrivari. Arbeiðsbólkurin hevði sín fyrsta fund 18. januar og hevur samanlagt havt níggju fundir.

Í arbeiðsbólkinum er viðgjørt, hvussu felags lønar- og starvsfólkafyrisiting skal verða skipað, hvussu markamótið skal vera við stjórnarráðini og stovnar, hvørji málini skulu vera fyri meginøkini: sáttmálasamráðingar, starvsfólkamál, áseta løn, førleikamenning og starvsfólkarøkt, lønarstovur og felags lønarskipan og fyri tænastumannaeftirlønir.

Sjey stovnar eru spurdir, hvørjar tænastur og batar, teir kundu hugsað sær. Eisini er Løgtingsins Umboðsmaður spurdur, hvussu hann heldur støðan er og hvørjir batar eru neyðugir. Samandráttur av teimum samrøðunum er í fylgiskjali 1.

Umboð úr Mentamálaráðnum, Almanna- og heilsumálaráðnum og av Gjaldstovuni hava viðgjørt partarnar um at savna lønarstovur, menna felags lønarskipan og tænastumannaeftirlønir.

Álitið er skipað soleiðis, at í fyrra parti er tilmæli um, hvar og hvussu økið skal verða skipað og hvar markamótið skal ganga. Gjørd er eisini ein tilfeingisuppgerð fyri, hvussu nógv ársverk eru neyðug, skal økið virka til fulnar.

Í seinra parti er útgreinað, fyri hvørt meginøki, hvussu tað er skipað í dag og hvørji mál, arbeiðsbólkurin hevur hugsað sær, at arbeitt skal verða fram ímóti.

*Argir, 28. mars í 2007*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Barbara á Tjaldraflotti<br>*Løgmansskrivstovan* | Snorri Fjallsbak<br>*Fíggjarmálaráðið* | Heri Joensen<br>*Fiskimálaráðið* | Maria á Dul<br>*Almanna- og heilsumálaráðið* |
| Bjarni Wilhelm<br>*Mentamálaráðið* | Atli Eiriksson<br>*Vinnumálaráðið* | Hilmar Høgenni<br>*Innlendismálaráðið* | Durita Tausen<br>*Skrivari* |

# 2. Tilmæli

Felag lønar- og starvsfólkafyrisitingin verður skipað í Fíggjarmálaráðnum, og virkar sum stápur hjá almennu fyrisitingini. Hon skal røkja verandi uppgávur hjá Lønardeildini, nakrar uppgávur sum liggja í hinum stjórnarráðunum og nýggjar uppgávur innan lønar- og starvsfólkaøkið.




Mælt verður til, at uppgávurnar í felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini verða:

- sáttmálasamráðingar
- áseta løn
- starvsfólkafyrisiting
- førleikamenning og starvsfólkarøkt
- tænastumannaeftirlønir

Á Føroya gjaldstovu verða:

- savnaða lønarstovan
- felags lønarskipan

Tær verða skipaðar sum tvær eindir.

At fáa greiði á tænastumannaeftirlønarøkinum er ein verkætlan fyri seg, har fyrsta stigið er uppruddingararbeiði. Tá ið uppruddingararbeiðið er av, er talan um tveir partar. Annar er at skráseta og rinda út eftirløn. Tað er sambæriligt við at útgjalda løn og verður tí partur av savnaðu lønarstovuni. Hin parturin er í høvuðsheitum vegleiðing og løgfrøðiligir spurningar. Tað kann verða samanborið við starvsfólkafyrisiting og fer at verða røkt í felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini.

Menningarparturin av felags lønarskipanini skal vera í tætt skipaðum samstarvi við felags lønar- og starvsfólkafyrisitingina og stovnarnar, sum eru knýttir at skipanini.




## 2.1 Uppgávur og markamót

Mælt verður til, at uppgávan og markamótið millum felag lønar- og starvsfólkafyrisitingina, stjórnarráðini og stovnarnar verður skipað soleiðis:

### Sáttmálasamráðingar

Stovnar venda sær beinleiðis til felags lønar- og starvsfólkafyrisitingina við krøvum um sáttmálabroytingar, soleiðis at felags lønar- og starvsfólkafyrisitingin hevur uppgávuna at samskipa krøvini, heilt frá fyrstantíð.

Tað má verða tryggjað, at tey sum sita við samráðingarborðið, hava umstøður at seta seg so væl inn í sáttmálaøkið, at tey vita, hvørjar avleiðingarnar av sáttmálabroytingum eru.

*Mettur starvsfólkatørvur: 4 ársverk*

### At áseta løn

Felags lønar- og starvsfólkafyrisitingin flokkar støv og ásetir lønina. Um neyðugt verður lønin ásett í samráð við viðkomandi fakfelag.

Setanarmyndugleikin vendir sær beinleiðis til felags lønar- og starvsfólkafyrisitingina. Er talan um serlig mál, t.d. vísandi til ábyrgd landsstýrismanna ella tí tað er principielt

mál, sendir felags lønar- og starvsfólkafyrisitingin viðkomandi stjórnarráðið málið til hoyringar. Serfrøðingastørv eftir BLF mugu tó fara um stjórnarráðið, tí hvørt stjórnarráðið hevur fingið ásetta kvotu.

*Mettur starvsfólkatørvur: 2 ársverk*

**Starvfólkafyrisiting**

Felags lønar- og starvsfólkafyrisitingin skal veita bæði stovnum og stjórnarráðum ráð og vegleiðing í starvsfólkarættarligum spurningum, um hvussu farið skal verða fram í sambandi við t.d. setan, ávaring, loysn úr starvi, farloyvi, sjúku, frítíð og hvussu sáttmálaásetingar skulu verða tulkaðar.

Leiðarin á einstøku stovnunum og í stjórnarráðunum hevur framvegis avgerðarrættin í starvsfólkamálum, t.d. hvør skal verða settur í starv og um broytingar skulu fara fram í setanarviðurskiftunum.

Viðkomandi landsstýrismaður ella stjórnarráð er framvegis kærumyndugleiki.

*Mettur starvsfólkatørvur: 2,5 ársverk*

**Førleikamenning og starvsfólkarøkt**

Felags lønar- og starvsfólkafyrisitingin setur út í kortið, ráðgevur, breiðir út vitan um og amboð til førleikamenning og starvsfólkarøkt, mennir ella byrtir upp undir at menna útbúgvingar og skipar HR-banka fyri tað almenna.

Stjórnarráð og stovnar hava ábyrgd av førleikamenningini á staðnum og at menna førleikan innan øki, sum eru serlig fyri teirra ráð ella stovn.

*Mettur starvsfólkatørvur: 2 ársverk*

**Savnaða lønarstovan**

Lønarstovan, sum verður á Gjaldstovuni, umsitur, rindar út lønir og vegleiðir stovnum í hesum sambandi.

Lønarstovan í Almanna- og heilsumálaráðnum eigur at verða flutt, men so leingi kommunulæknarnir eru beinleiðis umsitnir í Almanna- og heilsumálaráðnum, gevur tað meirarbeiðið í báðum støðum.

Uppgávurnar á Lønarstovuni í Mentamálaráðnum verða býttar sundur í at avgreiða lønir og umsita fólkaskúlan. Lønaravgreiðslan verður flutt í savnaðu lønarstovuna á Gjaldstovuni.

Aðrar lønarstovur eru, men mælt verður til, at hesar halda fram óbroyttar.

*Mettur starvsfólkatørvur: 5 ársverk*

**Felags lønarskipan**

Felags parturin í lønarskipanini skal verða styrktur, so at nóg mikið av orku er at vegleiða, testa, menna og taka sær av nýggjum uppgávum.

Vaktplansskipanin, sum Almanna- og heilsumálaráðið umsitur, verður ikki flutt í felags lønarskipanina í hesum umfarinum, tí arbeiðið at flyta stovnarnar úr verandi HP-3000 maskinuni, er ikki av.

Lønarforskipanin hjá Mentamálaráðnum verður heldur ikki flutt, tí hon partvíst virkar sum leiðsluamboð fyri fólkaskúlan.

*Mettur starvsfólkatørvur: 3 ársverk*

**Tænastumannaeftirlønir**

At umsita tænastumannaeftirlønir, so sum at skráseta eftirlønarrætt og rinda út eftirløn, verður á lønarstovuni á Føroya gjaldstovu. At kunna tænastumenn um eftirlønarrætt og ráðgeva setanarmyndugleikum í tænastumannamálum, verður savnað í felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini.

*Mettur starvsfólkatørvur: 3 ársverk*

## 2.3 Starvsfólkatilfeingi samanlagt

Tørvurin á starvsfólkum er:

| | ársverk |
|---|---|
| Samráðingar | 4,0 |
| Lønarásetingar | 2,0 |
| Starvsfólkafyrisiting | 2,5 |
| Førleikamenning | 2,0 |
| Tænastumannaeftirlønir | 3,0 |
| Lønarstova | 5,0 |
| Felags lønarskipan | 3,0 |
| Leiðsla og umsiting | 2,5 |
| **Samanlagt** | **24,0** |

Í Fíggjarmálaráðnum eru í løtuni 11 ársverk innan hetta økið, seks á Lønardeildini og fimm á Gjaldstovuni. Í hinum stjórnarráðunum eru leysliga mett umleið 6,5 ársverk. Eftir tí, verður sostatt neyðugt við umleið 6,5 ársverkum afturat.

**Útgreining:**

| | Í FMR | Onnur ráð | Nýggj |
|---|---|---|---|
| Lønardeildin | 5,8 | 3,5 | 1,7 |
| Førleikamenning | 0,2 | 0,0 | 1,8 |
| Lønarstova/lønarskipan | 4,0 | 2,0 | 2,0 |
| Tænastumenn | 1,0 | 1,0 | 1,0 |
| **Samanlagt** | **11,0** | **6,5** | **6,5** |

Nýggju ársverkini eru ætlað bæði at styrkja verandi uppgávur og at røkja uppgávur, sum í dag verða ikki røktar.

Skal felags lønar- og starvsfólkafyrisitingin virka til fulnar, er neyðugt, at servitanin verður savnað. Spurningurin um, hvussu nógv og hvørji starvsfólk skulu verða flutt úr hinum stjórnarráðunum, er ikki partur av uppgávuni hjá arbeiðsbólkinum og er tí ikki viðgjørdur.

# 2. Partur

# 3. Sáttmálasamráðingar

## 3.1 Sáttmálapartarnir í dag

Øll fakfeløg, ið hava limir á almenna arbeiðsmarknaðinum, hava sáttmála við Fíggjarmálaráðið um øll lønar- og setanarviðurskifti hjá teimum, sum sett eru eftir sáttmálanum.

Á almenna arbeiðsmarknaðinum eru 32 fakfeløg, sum hava sáttmála við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum.

Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur ábyrgdina av øllum hesum sáttmálum, m.a. at tryggja at allir sáttmálar innan tað almenna verða samskipaðir, og at felags karmar verða lagdir.

Fakfeløgini vilja tryggja limum sínum so góð rættindi innan arbeiðs- og lønarviðurskiftini, sum til ber.

## 3.2 Mál fyri sáttmálasamráðingum

Fyri felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini eru mál sett fyri samráðingum. Málini eru trý í tali.

**Nýggjur sáttmáli er í gildi, áðrenn gamli er farin úr gildi**

Fyritreyt fyri tí er, at arbeiðsgongdin er væl løgd til rættis, semja er um hana hjá báðum pørtum og byrjað verður í góðari tíð. Neyðugt er, at sáttmálaskeiðið er í øllum førum trý ár.

Samráðingarpartarnir mugu kenna hvør annan og sambandið skal verða røkt millum samráðingarnar. Partarnir skulu hittast til fundar eini tvær ferðir um árið at práta um leyst og fast, soleiðis at teir kenna hvør annan frá øðrum enn sáttmálasamráðingum.

**Felags sáttmáli um meginreglur**

Allir arbeiðssáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum hava orðingar og ásetingar, sum eru felags fyri øll fakfeløg. Tað hevði lætt munandi um arbeiðsorkuna hjá øllum pørtum, vóru fakfeløgini samd um at samráðast í felag um meginreglurnar og eisini lønarkarm.

Neyðugt er at hava greiðar mannagongdir um arbeiðsháttin. Áðrenn farið verður undir samráðingarnar, skulu feløgini frammanundan greitt boða frá, hvørji krøv eru felagskrøv, og hvørji krøv hvørt einstakt felag hevur. Eisini skal verða greitt, at

feløgini binda seg at samráðast saman, soleiðis at einki felag kann taka seg burtur úr samráðingunum.

Felags samráðingarnar skulu vera av í so mikið góðari tíð, at krøvini hjá hvørjum einstøkum felag eisini eru avgreidd og sáttmáli endaliga gjørdur, áðrenn gamli sáttmálin er farin úr gildi.

Felags sáttmáli lættir um hjá arbeiðsgevarum og starvsfólkum og tryggjar, at færri mistøk verða gjørd og at starvsfólk fáa síni rættindi.

**Sama lønarskipan fyri meginpartin av almennu starvsfólkunum**

Fyri at tryggja, at arbeiðsmarknaðurin verður liðiligur og at starvsfólk eru nøgd við tað lønarstig, tey eru á, fer at verða arbeitt við at gera eina lønarskipan, ella somu lønaráseting fyri helst allan og í øllum førum meginpartin av alment settu starvsfólkunum. Tað er eisini viðgjørt í partinum, sum eitur "Áseta løn".

## 3.3 Politiski myndugleikin

Politisku myndugleikarnir játta pening til lønir og annan rakstur. Tað verða sett alsamt størri krøv um skynsaman rakstur, samstundis sum krøvini um økta tænastu vaksa.

Harafturat krevja fakfeløgini, at limir teirra, ið útinna arbeiði fyri tað almenna, skulu hava góðar lønar- og setanartreytir og avbjóðandi størv, so tey støðast í arbeiði sínum.

Tí er tað neyðugt, at breið politisk semja er um fíggjarliga karmin, sum fíggjarmálaráðharrin hevur ásett skal galda í nýggja sáttmálaskeiðinum.

Hægsti myndugleikin undir øllum sáttmálasamráðingunum fyri Fíggjarmálaráðið er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum. Áðrenn farið verður undir sáttmálasamráðingarnar, ásetir landsstýrismaðurin fíggjarligu karmarnar fyri lønar- og kostnaðarstigið í nýggja sáttmálaskeiðnum. Fíggjarligu karmarnir skulu eisini vera í tráð við tey ynski, politiski myndugleikin hevur.

Landsstýrismaðurin skal verða kunnaður um øll upplegg til sáttmálakrøvini frá stjórnarráðum og stovnum. Øll endaliga útgreinaðu krøvini um broytingar í sáttmálunum, verða løgd fyri landsstýrismannin, áðrenn tey verða løgd fyri fakfeløgini.

## 3.4 Arbeiðsgongdin at gera nýggjan sáttmála

Stigini at gera nýggjan sáttmála eru:

- at fyrireika sáttmálasamráðingar
- at samráðast um nýggjan sáttmála
- at kunna um nýggja sáttmálan
- at eftirmeta sáttmálasamráðingarnar

**At fyrireika sáttmálasamráðingar**

Meiri enn eitt ár, áðrenn sáttmálarnir fara úr gildi, verður farið undir at fyrireika komandi samráðingarnar. Fyrstu stigini hjá Fíggjarmálaráðnum eru felags fundir og at fáa greiði á, hvørji krøvini hjá arbeiðsgevaranum eru. Síðani verður avtalað við fakfeløgini, hvussu samráðingarnar skulu fara fram.

Tíðarætlanin fyri samráðingum kann vera:

| | |
|---|---|
| September: *(árið fyri)* | Felags fundir - við fakfeløg, stjórnarráð og stovnar. |
| November: | Fáa krøv frá stjórnarráðum og stovnum.<br>Fund við fakfeløgini um samráðingarmannagongd<br>Fund við stjórnarráð og stovnar um krøvini, sum verða handað feløgunum |
| Desember: | Handa krøv og avtala felags samráðingar |
| Mars: | Semja um lønarkarm og felags krøv. Ber ikki til at fáa semju, er greitt skorið til, hvør ósemjan er. |
| Apríl: | Samráðingar við einstøku feløgini um serkrøv byrja. Ásett verður, hvørji raðfylgju feløgini samráðast í. |
| September: | Semjur eru gjørdar við øll feløg. Ber ikki til at fáa semju, er greitt skorið til, hvørjar ósemjurnar eru. |

*a. Felags fundir*

Fundir verða fyriskipaðir við umboð fyri fakfeløgini, stjórnarráðini og stovnar. Alt eftir hvat evnið á fundinum er, kunnu partarnir vera hvør sær ella saman.

Skráin kann fevna um:

- fyrilestrar
- framløgu
- bólkaarbeiði
- kjak
- tilmæli

*b. Krøv frá stjórnarráðum og stovnum*

Skriv verður sent stjórnarráðum og stovnum og heitt verður á tey at koma við ynskjum og broytingum til nýggja sáttmálan.

Ynski um broytingar koma eisini í sáttmálaskeiðnum, í samskiftinum við stovnar og stjórnarráð. Tey ynskini verða savnað, soleiðis at vent verður aftur til tey, tá ið krøvini verða orðað.

*c. Fundur við fakfeløgini um samráðingarmannagongd*

Tá ið øll ynski og krøv frá stjórnarráðum og stovnum eru viðgjørd, og endalig krøv eru orðað, verður kunnandi fundúr við allar formenn í fakfeløgunum.

Á hesum fundi verður miðað ímóti, saman við øllum formonnunum, at gera greiðar mannagongdir og áseta tíðarætlan fyri sáttmálasamráðingunum. Formenninir skulu hava møguleika at koma við ynskjum um gongdina til komandi samráðingar.

Fakfeløgini skulu boða frá, hvør felags samráðingarnevndin verður og Fíggjarmálaráðið samsvarandi, hvør teirra samráðingarnevnd er. Avtala verður gjørd um eina fasta mannagongd og tíðarætlan um, hvussu arbeiðshátturin skal vera undir allari samráðingargongdini.

Ásett skal vera, nær evsta mark er at lata krøv ella broytingar inn til nýggjan sáttmála, og eftir hetta kunnu nýggj krøv bara verða løgd fram, er full semja um tað millum partarnar.

**At samráðast um nýggjan sáttmála**

Felags samráðingarnevndin fyri fakfeløgini og samráðingarnevndin fyri Fíggjarmálaráðið hittast at handa hvør øðrum krøv og áseta fundir.

Avtalað skal verða, hvussu farið verður fram, vísir tað seg, at samráðingarnar bera ikki á mál.

Fyrst í samráðingunum skal samskifti vera við ráð og stovnar, soleiðis, sum tað liggur fyri. Tá ið samráðingarnar eru komnar longri, skulu ráð og stovnar ikki rokna við, at tað ber til at samskifta nógv ella at fáa ávirkan á samráðingargongdina.

Tá ið felags samráðingarnar eru av, verða fakfeløgini boðsend á felags fund at fáa greiði á, hvussu samráðingar um serkrøv skulu fara fram. Avtalað verður, hvør raðfylgjan skal verða og hvussu nógv tíð skal verða sett av til hvørt felagið.

Avtala skal eisini verða gjørd um greiðar mannagongdir viðvíkjandi at kunna fjølmiðlar og onnur. Miðað skal verða eftir, aftaná hvønn fundin, at hava eina felags kunning um gongdina undir sáttmálasamráðingunum.

**Kunna um nýggja sáttmálan**

Tá ið samráðingarnar eru av, kunnar Fíggjarmálaráðið stjórnarráðini og stovnarnar um broytingarnar í sáttmálunum. Vegleiðingar verða skrivaðar og fundir eru við tey, sum umsita sáttmálarnar. Uppfylgjandi fundir vera eisini, tá ið eitt sindur er fráliðið, so at tryggjað verður, at sáttmálarnir verða umsitnir líka á øllum lønarskrivstovunum og stovnunum.

**Eftirmeta samráðingarnar**

Fyri at sáttmálasamráðingarnar alsamt kunnu verða betri, verður samráðingargongdin eftirmett, bæði innanhýsis, saman við feløgunum og saman við stjórnarráðum og stovunum. Skrivlig niðurstøða verður gjørd.

Eftirmetingin er fyrsta fyrireikingarstigið til næstu samráðingarnar.

# 4. Starvsfólkamál

## 4.1 Støðan í dag

Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum ráðgevur og vegleiðir stjórnarráðum í starvsfólkamálum. Ymiskt er, hvørja ráðgeving stjórnarráðini veita sínum stovnum. Eitt stjórnarráð hevur skipað ráðgevingina og vegleiðingina í eini deild burturav, onkur stjórnarráð hava skipað seg við serligum ábyrgdarfólki, men í flestu stjórnarráðunum er uppgávan býtt út á fleiri fólk. Tað ber í sær, at samanlagt verður uppgávan ikki altíð røkt nøktandi.

Løgtingsins Umboðsmaður hevur viðgjørt fleiri klagur um starvsfólkamál, sum starvsfólk ella fakfeløg halda, eru illa handfarin. Av úrskurðunum er ábendingin, at gundstøðið er ov vánaligt og at grundleggjandi vitan manglar. Farið verður ov ofta fram eftir fummum og avleiðingarnar eru óhepnar.

## 4.2 Mál

Fyri at skapað fyritreytir fyri trivnaði, munadygdsemi og rættleika, verður ráðgevingin og vegleiðingin um starvsfólkamál savnað og styrkt. Fyri at bøta um, eru hesi mál sett:

**Skikkað ráðgeving og vegleiðing til stjórnarráð og stovnar**

Felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini skipar fyri, at leiðslur verða skúlaðar og fáa dygdar ráðgeving og vegleiðing í øllum starvsfólkamálum, soleiðis at tær eru brynjaðar at loysa málini væl og at taka rætta avgerð.

Ráðgevingin og vegleiðingin verða innan m.a. hesi øki:

- Setan
- Royndarsetan
- Broytingar í starvsinnihaldinum
- Flyta tænastustað
- Talufrælsi
- Tagnarskylda
- Hjástørv
- Loysa úr starvi – uppsagnartíð, burturvísing, 120-daga regla
- Loysa úr starvi – serligar uppgávur (álitisfólk, trygdarumboð og samstarvsnevndarlimir)
- Agamál og decorum

Tað verða gjørdar vegleiðingar og annað skrivligt tilfar, sum alt eisini verður tøkt á heimasíðuni hjá felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini. Skipað verður fyri skeiðum, umframt at hóskandi netverksbólkar kunnu verða skipaðir.

## Umsitið verður eftir somu meginreglum á øllum stovnum

Tryggjað verður, við vegleiðingum og ráðgeving, at umsitingin á øllum stovnunum verður eins, soleiðis at skeivleikar í sáttmálatulkingum, lønarútgjaldinum, flokkingum og líknandi verða fyribyrgd.

Vegleiðingar eru á fleiri økjum, men tað er ikki løtuverk at fáa betri greiði á, hvussu sáttmála- og lógarásetingar skulu verða umsitnar rætt. Tað krevur nógv útgreiningararbeiði og samskifti við tey, sum umsita sáttmálar og lønir. Verður greiða fingin á tí, soleiðis at meginreglur kunnu verða gjørdar, fer tað at lætta nógv um í gerandisdegnum.

Hesi øki eru viðkomandi at gera meginreglur fyri:
- Felags setanarviðurskifti
- Einstaklinga setanartreytir
- Barsilsskipan
- Barnsburður/ættleiðing
- Serstøk frívika
- Arbeiðstíð
- Frávera/tænastufrí
- Sjúka hjá børnum
- Frítíð og frítíðarløn
- Sjúka

## Vísa á og gera uppskot um neyðugar broytingar í lógarverkinum

At dagføra lógarverkið er uppgáva, sum alla tíðina skal verða røkt, fyri at tryggja, at ásetingarnar eru tíðarhóskandi.

Meginlógirnar á økinum eru:
- Tænastumannalógin
- Tænastumannaeftirlønarlógin
- Starvsmannalógin
- Frítíðarlógin
- Barsilslógin
- Arbeiðsumhvørvislógin.

Tænastumannalógirnar eru bara galdandi fyri almenna arbeiðsmarknaðin, men hinar eru allar galdandi fyri allan føroyska arbeiðsmarknaðin.

Tænastumannalógirnar treingja javnan til at verða dagførdar, tí nógv av tí, sum fyri sáttmálasett starvsfólk verður avtalað í sáttmála, er fyri tænastumenn ásett í lógunum í staðin. Verða týðandi broytingar gjørdar í sáttmálunum, er vandi fyri, at tænastumenninir verða afturúrsigldir, verða lógirnar ikki dagførdar samsvarandi.

Frítíðarlógin og Starvsmannalógin eiga at verða dagførdar. Frítíðarlógin byggir t.d. á seks daga arbeiðsviku og Starvsmannalógin á, at maðurin er einauppihaldari.

Tá ið donsk málsøki verða yvirtikin, er týðandi, at lóggávan er fullfíggjað og at fyrireikingararbeiðið verður væl úr hondum greitt, eisini tá ið talan er um starvsfólkapartin. Viðkomandi stjórnarráð skal avgreiða starvsfólkapartin í samráð við felags lønar- og starvsfólkafyrisitingina.

**Góðskutrygging**

Heilt frá tí, at lýst verður eftir fólki til fólkið fer úr starvi, skal møguleiki vera fyri at fáa góðskutrygging. Hugsað verður um alt tað, sum stendur undir 'Skikkað ráðgeving og vegleiðing til stjórnarráð og stovnar' og 'Umsitið verður eftir somu meginreglum á øllum stovnum'. Tað verður gjørt fyri at tryggja, at rætt verður farið fram og at mannagongdir verða fylgdar. Góðskutryggingin skal borga fyri, at sloppið verður undan óneyðugum og slítandi ivamálum.

## 4.3 Setanarmyndugleiki

Setanarmyndugleikin, og tí eisini avgerðirnar í starvsfólkamálum, eru og verður framvegis í einstaka stjórnarráðnum og á einstaka stovninum, men ráðgevingin er úr felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini.

At vegleiðingin og ráðgevingin er savnað á einum staði, ger eisini, at verður málið kært til stjórnarráðið, hevur stjórnarráðið ikki tvífaldan leiklut. Neyðugt er tó við ávísum førleika í stjórnarráðnum, men ikki á sama stigi, sum í dag.

# 5. Áseta løn

## 5.1 Støðan í dag

Løn hjá alment settum verður sum meginregla ásett í sáttmála millum viðkomandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

Tá ið starv skal verða flokkað ella umflokkað, er mannagongdin, at stovnurin sendir sínum stjórnarráðið umsóknina. Heldur stjórnarráðið, at grundarlag er fyri umsóknini, verður umsóknin og eitt tilmæli sent Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum. Lønardeildin viðger síðani umsóknina og setir seg, um neyðugt, í samband við viðkomandi fakfelag fyri at áseta endaligu flokkingina.

Tað er ójavnt, hvussu flokkingar- og umflokkingarmál vera viðgjørd í stjórnarráðunum. Summi stjórnarráð viðgera málini nágreiniliga, men onnur stjórnarráð senda tey óviðgjørd víðari.

At áseta løn er annað enn bara at áseta føstu lønina. Nevnd kunnu verða viðbót fyri áramálssetan, viðbót fyri serligar uppgávur ella serlig ábyrgd, gjald fyri ólagaliga arbeiðstíð, munaløn, yvirtíð og lønaraldur. Løn og arbeiðstíð, tá ið starvsfólk er á skeiði, eru eisini serligar ásetingar fyri í onkrum sáttmálum, men tað manglar í øðrum. Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur um hendi teir spurningarnar. Tað sama er galdandi fyri gjøld í sambandi við tænastuferðir, koyripening, telefon og fundarpening.

Nevndarsamsýningar verða í høvuðsheitum ásettar á sama hátt, sum flokkingar og umflokkingar, soleiðis at skilja, at tað er stjórnarráðið, sum vendir sær til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum at áseta samsýningina hjá nevndarlimunum.

## 5.2 Mál

Ofta verður ført fram, at høg løn er ikki tað, sum heldur einum starvsfólki til (motiverar). Spurningurin er tó, um kenslan at fáa ov lága løn ella kanska heldur órættvísa løn, ikki kann køva arbeiðshugin. Eisini kann tað hava somu ávirkan, tekur tað ov langa tíð at fáa svarað umbøn um umflokking.

**Styttri avgreiðslutíð**

Tá ið starv skal verða sett, er tað ógvuliga týðandi, at skjótt gongur at áseta lønina. Tað sama er galdandi, verða størv broytt so mikið nógv, at tey skulu verða umflokkað. Við skipanini við miðsavnaðari lønaráseting, er neyðugt við meiri arbeiðsmegi í Fíggjarmálaráðnum fyri at avgreiða flokkingarmál við rímiligari freist.

**Líka løn fyri størv, sum hava sama virði**

Starvsfólk og arbeiðsgevarar bera ofta uppá mál, at tey kundu hugsað sær, at størv, sum líkjast, eru lønt líka. Er tað ikki so, ber tað í sær ónøgd. Tá ið størv í ymiskum

sáttmálum verða samanborin, er neyðugt at hyggja at øðrum enn bara føstu lønini. Nógvur munur kann t.d. vera á arbeiðstíð, yvirtíð, eftirløn, vaktargjøldum og lønargongd. Ringt kann eisini vera at áseta virði á ábyrgd, avrik, royndir og útbúgving.

Fyri at gjøgnumskygni kann vera, er neyðugt við líkari sáttmálaásetingum. Neyðugt er eisini, at somu meginreglur eru galdandi fyri flokkingar og at semja er um tær. Tvær semjur eru gjørdar um sáttmálar, sum ganga til 1. oktober í 2010. Í báðum semjum eru protokollat um almenna lønarlagið.

> ***Semjan við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar:***
> *"Fíggjarmálaráðið fer saman við fakfeløgum at finna fram til almennar reglur um, hvussu almenn størv skulu verða flokkað og lønt. Verður í semju funnið fram til tílíkar leiðreglur, verða sáttmálasamráðingar frá 2010 at rokna at fara fram eftir hesum leisti: Triðingurin av almennu lønarpuljuni verður sett av til "vanligar" sáttmálasamráðingar. Hinir tveir triðingarnir av almennu lønarpuljuni verða settir av til at javna teir skeivleikar, sum eru í almenna lønarlagnum. Hugsað verður um at hyggja at tí Íslendska modellinum."*
>
> ***Semjan við Starvsmannafelagið:***
> *"Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið eru samd um, at orðast skal protokollat um almenna lønarlagið, við tí endamáli at áseta almennar reglur um, hvussu almenn størv skulu flokkast og lønast.*
> *Endamálið er at javna teir skeivleikar, sum eru í almenna lønarlagnum. Hugsað verður at hyggja at tí Íslendska modellinum."*

Verður undirtøkan so mikið stór millum fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum, at grundarlag er fyri at áseta almennar reglur um, hvussu almenn størv skulu verða flokkað og lønt, er ein pallur at byggja á, soleiðis at líknandi størv verða lønt líka.

Tað, sum í semjunum verður rópt íslendska modellið, er ein lønarskipan, sum Reykjavík kommuna brúkar. Upprunaliga er tað ein lønarskipan, sum er ment í Onglandi.

Lønin er samansett við grundupphædd, førleikaviðbót, avriksviðbót og møguleika fyri at geva tíðaravmarkaða eftirspurningsviðbót. Fyri at áseta grundupphæddina, verða øll størv mett. Í metingini eru fýra høvuðstættir: kunnleiki og royndir, hvussu strevið starvið er, ábyrgd og umhvørvi. Førleikaviðbótin er grundað á menningarætlan og kynsblinda (neutrala) førleikameting. Avriksviðbótin er grundað á balanced scorecard.

Íslendski kommunali arbeiðsgevarin heldur, at starvsmetingin ger, at gjøgnumskygni er í, hví størv verða lønt ymiskt, at tað ber til at samanbera ymisk yrki hvørt við annað, at grundgevingar eru fyri hví lønin er sum hon er og at til ber at rinda somu løn fyri størv, sum eru lík ella hava sama virði.

Sum frálíður hevði verið betri, hevði borið til at givið stjórnarráðum og stovnum størri frælsi at ásett lønina sjálvi. Tað krevur miðfirraðan førleika, gjøgnumskygni soleiðis at størv í ymiskum støðum kunnu verða samanborin og at tað er alment kunnugt, hvussu ymisku stjórarnir løna sínum starvsfólkum.

# 6. Førleikamenning og starvsfólkarøkt

## 6.1 Støðan í dag

Fíggjarmálaráðið og flestu fakfeløgini hava ásetingar um førleikamenning. Í avtaluni frá 2001 stendur m.a.:

*Leiðslur og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá landsins stovnum. Tað er tað arbeiði, sum tey í landsins tænastu inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at landsins stovnar mennast.*

*Partarnir eru tí samdir um, at:*

- *miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri virkisfýsnum almennum stovnum við høgum tænastustigi.*
- *hvør stovnur sær skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvør stovnur at seta sær miðvís menningarmál.*
- *endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna almenna tænastuførleikan.*
- *starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá stovninum er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.*

Í 2003 varð serstøk avtala gjørd um strategiska og skipaða førleikamenning á stovnum landsins. Í innganginum til avtaluna stendur:

*Skulu uppgávurnar hjá stovnum landsins verða røktar á munadyggan hátt við neyðugari dygd og framhaldandi menning, er sera týðandi, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir.*

*Stk. 2. Partarnir halda tað vera avgerandi, at starvsfólk hjá landinum fáa møguleika at menna sín førleika, bæði í dagliga arbeiðnum og við eftirútbúgving og víðari útbúging. Fyri at fremja førleikamenningina eiga leiðslur og starvsfólk í felag at hava sum mál at stovna felags læruumhvørvi og at leggja til rættis eina smidliga tilgongd fyri førleikamenningini. Partarnir eru samdir um, at strategisk mál fyri menningini skulu verða gjørd fyri øll starvsfólk.*

Karmarnir at skipa førleikamenningina eru sostatt avtalaðir. Ábyrgdina at fylla karmarnar er í høvuðsheitum løgd á starvsfólk og leiðslu á staðnum. Sáttmálapartarnir sjálvir hava ikki stuðlað nóg væl at fáa tað at virka í verki. Okkurt einstakt tiltak hevur verið fyriskipað miðsavnað.

## 6.2 Mál

Fyri at tryggja, at førleikamenningin enn betur fer at virka í verki, eru mál sett.

**Alsamt dugnaligari**

Fyri at tryggja, at landsins stovnar og starvsfólkini hava dagførdan førleika og verða alsamt dugnaligari, mugu førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir.

Almennir stovnar og almenn starvsfólk skulu vera klár at taka ímóti nýggjum avbjóðingum og megna at finna nýggjar og betri loysnir. Rúm skal vera fyri nýhugsan og skapandi gávum.

Flytførisskipanir eru ein máti at førleikamenna starvsfólk. Tað byrtir eisini upp undir, at starvsfólk eru betur før fyri at laga seg eftir umstøðunum og hava heildarfatan. Flytførisskipanir kunnu vera millum almenn starvsstøð, almenn og privat starvsstøð og í norðurlendskum tænastumannaumbýti.

Fortreytirnar skulu vera í lagi, soleiðis at skiftisskipanirnar verða bæði starvsstøðum og starvsfólkunum at gagni, og at uppgávurnar samstundis verða røktar til lítar.

**Skipað menning**

Tað kann gera førleikamenningaruppgávuna tunga og møtimikla, at øll ábyrgdin liggur á leiðslu og starvsfólkunum á hvørjum stovni sær. Fyri at lætta um og betur tryggja, at komið verður á mál, verður ábyrgdin at seta út í kortið, stuðla og leggja til rættis menningartiltøk, savnað í felags lønar- og starvsfólkaumsitingini. Tó er tað leiðslan og starvsfólkini á einstaka stovninum, sum hava ábyrgdina av at tryggja, at førleikamenningin verður framd í verki.

Leiðslurnar skulu fáa hóskandi útbúgvingar- og menningartilboð og amboð at menna síni starvsfólk. Ráðgivið verður um t.d. starvsfólkasamrøður, hvussu starvsfólk verða hildin til og hvat er uppi í tíðini, tá ið talan er um at leiða starvsfólk. Leiðslurnar skulu røkja síni starvsfólk og duga at loysa starvsfólka-trupulleikar, fyrsta teir stinga seg upp.

Viðkomandi útbúgvingartilboð, eisini á fakligum stigi, skulu vera tøk. Tað skal yvirskipað verða rótfest í felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini, men praktiski parturin kann verða útveittur til útbúgvingarstøð ella annan útbjóðara. Krøvini til, hvussu og hvørji skeiðini skulu vera, skulu verða orðað í almennu fyrisitingini, umvegis felags lønar- og starvsfólkaumsitingina og hon skal eisini standa fyri skipaðum samskifti millum tey, sum eftirspyrja og tey, sum útbjóða. Felags lønar- og starvsfólkafyrsitingin skal javnan menna og eftirmeta førleikamenningina.

Samskifti skal vera við leiðslur, starvsfólk og fakfeløg um, hvussu tað gagnligast verður skipað. Regluliga skal verða skipað fyri evnisdøgum og kveikingardøgum, eini tvær ella fýra ferðir um árið, við gjøgnumgangandi tema og viðkomandi evnum.

## Betri trivnaður og nøgdsemi

Fyri at tryggja, at borgarar landsins fáa munadygga tænastu og at almenn størv eru lokkandi, mugu starvsfólkini trívast og vera nøgd. Nøgdsemis- og trivnaðarkanningar skulu verða gjørdar, og t.d. sjúkufráveruni skal verða hildið eyga við, fyri at tryggja, at bøtt kann verða um hana, á teimum økjum, har tað ber til.

Undir teirri fortreyt, at uppgávan verður loyst til lítar, skal rúm vera fyri yngri sum eldri, monnum sum kvinnum, fólki við ymiskum førleika, bæði tá ið talan er um útbúgving, starvsroyndir og arbeiðsevni.

## Kappingarfør at fáa starvsfólk

Tá ið tað gongur væl búskaparliga, missir tað almenna ofta nógv starvsfólk. Lønin hevur ávirkan, men nógv annað er, sum hevur líka stóran og størri týdning.

Ein leistur er gjørdur at taka ímóti nýggjum fólki í miðfyrisitingini, við introskrá til fyrstu vikuna í starvinum. Eisini er kunningartilfar gjørt til kunningarfund, sum verður hildin umleið hvønn ársfjórðing, har kunnað verður um, hvussu miðfyrisitingin er skipað og um felags virðisgrundarlagið. Fakliga eru nógv nýsett tó sum tveitt á bláman. Ofta er eingin at seta tey við, og eingin bjargingarvestur er at finna. Eindirnar eru smáar og viðbreknar.

Sum eisini er nevnt í grundarsteinum 'Samfelagsbygnaður' í visjón 2015, hevði ein stórur bati verið, at miðfyrisitingin verður savnað og umsitingarligu eindirnar færri og sterkari. Fakliga umhvørvið verður betri, samskiftismøguleikarnir verða betri og eisini vitanargrundarlagið, tá ið avgerðir skulu verða tiknar.

## Starvsfólkabanki (HR)

Fyri at tryggja, at tað almenna hevur greiði á, hvørjar førleikar starvsfólkini hava og tí eisini hvørjar førleikar neyðugt er at menna, verður starvsfólkabanki gjørdur, har førleikarnir verða skrásettir. Aldurin á starvsfólkunum er eisini skrásettur, soleiðis at lættari er at seta fólk við, so hvørt sum tey eldast, sum eru í starvi.

Starvsfólkabankin kann eisini verða brúktur til at halda skil á frítíð, sjúku, menningarsamrøðum, merkisdøgum og øðrum.

At fáa eina HR-skipan er ein verkætlan í sær sjálvum, sum óivað er gagnligast at skipa í samstarvi millum nakrar almennar stovnar. Fyri at sleppa undan dupult inntøppingum, skal dentur verða lagdur á, at amboðini sampakka við skipanir, sum longu verða brúktar. HR-skipanin skal verða brúkt sum stýringaramboð, ikki sum eftirlitsamboð.

# 7. Lønarstovur og felags lønarskipan

## 7.1 Støðan í dag

Felags lønarskipanin er býtt í ein kervispart, sum edv-deildin á Føroya gjaldstovu umsitur og ein lønarumsitingarpart, sum Lønarstovan á Føroya gjaldstovu í dag umsitur. Lønarumsitingarparturin er aftur býttur í tvey, ein felags fyri øll og ein individuellan part.

Felags partin umsitur Føroya gjaldstova. Har eru stamdáta so sum sáttmálar, talvur, kreditorar og lønarsløg. Felags parturin er grundarlagið undir lønarskipanini og krevur holla vitan um og fatan av, hvussu lønarskipanin virkar.

Stóru lønarstovurnar í dag eru á hesum stovnum og í hesum ráðum:

- Føroya Gjaldstovu
- Mentamálaráðnum
- Almanna- og heilsumálaráðnum
- Almannastovuni
- Suðuroyar sjúkrahúsi
- Klaksvíkar sjúkrahúsi
- Landssjúkrahúsinum
- Nærverkinum.

Fýra tær fyrstu eru í felags lønarskipanini. Sjúkrahúsini og Nærverkið hava sína egnu lønarskipan sum er, men eru á veg inn í felags lønarskipanina.

Umframt hesar lønarstovurnar, sum eru í felags lønarskipanini, eru fleiri stovnar, sum hava egna lønarskipan. Teir eru m.a. Tekniski skúli, Handilsskúlin, Strandfaraskip Landsins, Kringvarp Føroya og nøkur ellis- og røktarheim, sum eru sjálvsognar-stovnar.

Sambandi millum eindirnar kann verða teknað soleiðis:



Individuella partin hava lønarstovurnar atgongd til og tær skráseta, útgjalda og bóka hvør í sínum lagi og hava ábyrgdina at avgreiða lønir. Lønarstovurnar spyrja javnan um eitt hvørt, sum hevur við avgreiðsluna at gera og Lønarstovan á Føroya gjaldstovu vegleiðir teimum í tí.

Allar lønir, sum fara umvegis lønarskipanina, verða goldnar umvegis A-talið hjá Føroya gjaldstovu. Tað ber í sær, at Føroya gjaldstova avstemmar alt mótvegis T&S, AMEG, ALS og BAS, og at hon rindar út til kreditorar, sendir út lønarseðlar, rindar og bókar lønirnar. Tað gjørdu lønarstovnurnar hvør í sínum lagi, áðrenn tær komu í felags lønarskipanina.

## 7.2 Mál

Málini eru:

**Alsamt menna felags lønarskipanina**

Ein menningarbólkur er skipaður, sum hevur fund aðru hvørja viku. Millum limirnar í bólkinum eru umboð fyri Gjaldstovuna, Almanna- og heilsumálaráðið og Mentamálaráðið umframt Tórshavnar kommunu og Sam-Teld. Á fundunum koma ynski um broytingar, sum Gjaldstovan hevur ábyrgdina at samskipa.

Verður manningin úr stjórnarráðunum savnað, er betri møguleiki fyri at brúka ta arbeiðsmegina beinleiðis til at menna og viðlíkahalda skipanina.

At menna felags lønarskipanina merkir eisini, at tað skulu verða mentar nýggjar funkur, at broytingar, rættingar og test verða gjørdar og kt-loysnir dagførdar.

**Menna stýringaramboð**

Leiðslukunning um lønir skal verða skipað, lønardátuvøruhús fyrisitið og dáturnar verða skipaðar, soleiðis at tær kunnu verða brúktar til stýringarendamál. Lønarhagtøl skulu verða kunngjørd javnan.

Tað skal vera sum stuðul hjá teimum, sum samráðast um og umsita sáttmálar og til teirra, sum hava fíggjarstýringina og lønarspurningar um hendi í stjórnarráðum og á stovnum.

HR-banki skal verða mentur. Fyri at gera tað so gagnligt og ómakaleyst sum til ber, skal HR-bankin kunna taka dátur úr felags lønarskipanini.

Allar lønir verða í dag ásettar miðsavnað á Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum. Tað er ikki gongd leið í longdini, men skal tað verða miðfyrrað, er neyðugt við betri talgrundarlagi og meiri gjøgnumskygni í lønarhagtølunum. Lønarhagtølini skulu eisini stuðla undir arbeiðið at gera nýggjar lønarmyndlar.

## Kunna og vegleiða nágreiniliga um felags lønarskipanina

So hvørt skipanin verður ment, tvs. eitt nýtt modul verður tikið í nýtslu, verður kunnað og undirvíst í tí og vegleiðingar verða gjørdar.

Ein arbeiðsuppgáva verður yvirskipað at áseta og hava eftirlit við, hvussu lønir verða umsitnar í lønarskipanini. Ein onnur uppgáva er at umsita stamdátur so sum sáttmálar, lønartalvur, kreditorar og hvørji lønarsløg eru.

Til skal bera at geva fólkið høgan førleika at brúka felags lønarskipanina, t.e. út í æsir at kenna skipanina og møguleikarnar við skipanini.

## Fullfíggjaða vegleiðing í at rinda út lønir

Lønarstovan skal veita stovnsleiðslum vegleiðing í spurningum, sum eru beinleiðis knýttir at lønum, samsýningum og líknandi.

Fyri at vegleiðingin og menningin skulu verða so góðar sum til ber, skal tætt skipað samstarv vera millum felags lønar- og starvsfólkafyrisitingina, felags lønarskipanina og Lønarstovuna.

# 8. Tænastumannaeftirlønir

## 8.1 Støðan í dag

Tænastumannasetan er fevnd av fleiri lógarásetingum enn vanliga sáttmálasetanin. At umsita tænastumannasetan og tænastumannaeftirlønir er øki, sum krevur servitan og kontinuitet.

Fyrstu árini eftir at føroyska umsitingin varð skipað, vóru ikki so nógvir tænastumenn. Tænastumenn og eftirløntir tænastumenn vóru samanlagt færri enn 100 í tali. Almenna fyrisitingin var eisini lítil og hon var savnað.

Í sambandi við yvirtøkurnar, sum eru framdar seinastu 35 árini, eru tænastumenninir og eftirløntu tænastumenninir vorðnir nógv fleiri í tali. Orsøkin er, at nógv av starvsfólkunum, sum vórðu yvirtikin, vóru tænastumenn. Nú eru samanlagt fleiri enn 1000 tænastumenn og eftirløntir tænastumenn.

Trý stjórnarráð, Fíggjarmálaráðið, Almanna- og heilsumálaráðið og Mentamálaráðið, umsita í dag tænastumannaeftirlønir. Aftur at tí eru fleiri stovnar, sum eisini umsita og rinda út eftirlønir til tænastumenn.

Vitanin er ikki savnað á einum staði, men er ógvuliga spjødd. Skipanir mangla at umsita eftirlønir og regluverkið er ógvuliga ófullfíggjað á nógvum økjum.

Løgtingsgrannskoðanin hevur átalað og víst á, at stjórnarráðini umsita ikki eftirlønarpartin nóg væl og at einki yvirlit er yvir samanløgdu eftirlønarskylduna hjá landinum.

## 8.2 Mál

Mælt verður til, at uppgávan at umsita tænastumannaeftirlønarøkið verður skipað í felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini. Uppgávurnar, sum í dag eru spjaddar í stjórnarráðunum og á stovnum, verða savnaðar her.

**Skráseta allan eftirlønarrætt**

Fyri at tryggja, at greitt er, hvør fíggjarliga skyldan hjá tí almenna er og fyri at tryggja, at einstaki tænastumaðurin fær síni rættindi, tá ið talan er um eftirløn, verður allur eftirlønarrættur og eftirlønaraldur skrásettur.

Skrásetingaruppgávan er stór og nógv skal verða leitað fram. Stjórnarráðini hava t.d. ikki skrásett rættin til útsetta eftirløn ella hjúnafelagseftirløn í sambandi við hjúnaskilnað. Har er stórur vandi fyri, at onkur dettur burtur ímillum.

Lønarskipanin verður ment, soleiðis at eftirlønaraldurin verður dagførdur hvønn mánað.

## Fáa greiði á býtinum millum danska og føroyska eftirlønarskyldu

Tá ið yvirtøkurnar vórðu gjørdar í 70- og 80-árunum, var ikki altíð greitt avtalað, hvussu eftirlønarskyldan skuldi verða býtt millum føroyskar og danskar myndugleikar. Í tí sambandi hava ivamál eisini onkuntíð stungið seg upp, um einstakir tænastumenn eru føroyskir ella danskir tænastumenn.

Neyðugt verður við samskifti og kanska samráðingum við danir, soleiðis at eingin ivi verður um býtið og at býtisskipanin verður greið og løtt at umsita.

## Tænastumaðurin kann altíð fáa upplýst hvørji rættindi hann hevur

Fleiri tænastumenn eru, sum ikki vita, hvussu statt er við teirra eftirløn. Teir fáa ikki regluliga yvirlit yvir eftirlønaraldurin, ivi er kanska um onkur ár, tá ið teir hava verið í orlov ella settir hjá øðrum almennum myndugleika. Sum er, verða hesi ivamálini ofta ikki viðgjørd og avgreidd, fyrr enn tænastumaðurin er komin upp ímóti fráfaringar-aldri. Tað er stak óheppið og sømir seg heldur ikki.

Setanarmyndugleiki og tænastumaðurin sjálvur skulu, tá ið brúk er fyri tí, altíð kunna fáa upplýst, hvør eftirlønaraldurin er og hvør eftirlønarupphæddin er. Tað er einamest viðkomandi, tá ið tænastumaðurin skal fara úr starvi, bæði tá ið hann sjálvur sigur upp og tá ið myndugleikin ætlar at siga hann upp.

Ætlar tænastumaðurin at siga seg úr starvi, hevur setanarmyndugleikin skyldu at boða tænastumanninum frá, um tað t.d. loysir seg betur at bíða í nakrar mánaðir at fara úr starvi, soleiðis at eftirlønin verður væl hægri. Tann vegleiðingin er ikki skipað í stjórnarráðunum sum er, og myndugleikin røkir av tí sama ikki sína skyldu til lýtar.

## Regluverkið skal vera fullfíggjað

Øki eru eisini, har tað vanta reglur, bæði tá ið talan er um eftirløn og tænastumannasetan annars. Nevnd kunnu verða leiðreglur í sambandi við sjúku og at keypa eftirlønarrætt. Ofta verður víst til danskar reglur, men tað er ikki altíð nøktandi og rætt.

Tað er stórur vandi fyri, at hvørki tænastumenn ella leiðslur teirra vita, hvørji rættindi og skyldur tænastumaðurin hevur. Fyri at tryggja øllum tænastumonnum síni rættindi, og somu rættindi, er neyðugt at fáa regluverkið dagført og fullfíggjað.

# Samrøður við stovnar

Í februar varð prátað við sjey almennar stovnar, um hvørjar tænastur og batar teir kundu hugsað sær á lønar- og starvsfólkaøkinum. Stovnarnir eru Hagstovan, Kringvarpið, Landsverk, Matrikulstovan, Nærverkið og Tekniski skúli í Havn. Stovnarnir eru ymiskir í støðd og vavi. Nakrir eru í BSL og aðrir hava egna skipan. Samanlagt umboða teir flestu stjórnarráðini.

Eisini hevur verið prátað við Løgtingsins umboðsmann. Løgtingsins umboðsmaður hevur eftirlit við almennu fyrisitingini og kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikum og hvussu teir viðfara borgarar og mál. Tað eru tíverri ikki so fá starvsfólkamál, sum fara um borðið hjá Løgtingsins umboðsmanni.

Niðanfyri er tað samanskrivað, sum stovnarnir í høvuðsheitum søgdu í prátunum. Prátið við Løgtingsins umboðsmann stendur niðast.

## Sáttmálasamráðingar

Stovnsleiðslurnar kenna seg at vera ov langt burturi frá samráðingunum. Tær hava uppskot um sáttmálabroytingar, senda sínum stjórnarráðið tær, men hoyra síðani einki aftur.

Tað ger tað trupult at fáa endarnar at røkka saman, at peningur fylgir ikki við sáttmálabroytingunum.

## Løn

Summir stovnsleiðarar kundu hugsað sær at kunna gjørt mun á fólki og kunna givið t.d. tíðaravmarkaðar viðbøtur og staðbundna løn. Aðrir stovnar vilja ikki hava lønarsamráðingarnar út á arbeiðsstaðin.

Avgreiðslutíðin er ov long, tá ið starv skal verða flokkað ella umflokkað. Tað er serliga keðiligt, tá ið talan er um nýggja setan og ikki ber til at siga umsøkjaranum, hvørja løn, hann kann vænta at fáa.

Fólk vilja hava rættvísa løn og gjøgnumskygni í lønarásetingum.

## Starvsfólkamál

Serfrøði manglar á stovnunum og tað er ikki altíð so lætt at finna hana í almennu skipanini. Gott kunnandi tilfar manglar, um millum annað setan og uppsøgn.

Leiðslur eru ikki nóg væl lærdar at fyribyrgja starvsfólkatrupulleikum. Tær síggja ikki trupulleikarnar, fyrr enn tað er ov seint. Tær skulu læra at fyribyrgja, heldur enn at viðgera.

Onkur stovnur helt, at tað er óheppið, at stjórnarráðini hava dupulta myndugleikan bæði at vera ráðgevi og vera kærumyndugleiki. Betri er at flyta og savna ráðgevingina á einum staði.

**Tænastumenn**

Eftirlønarøkið skal verða skipað betur. Stovnsleiðslur og starvsfólk kenna seg ikki trygg, tá ið talan er um eftirlønarviðurskifti, hvørki fyri tey, sum hava rætt til føroyska eftirløn ella fyri tey, sum hava rætt til danska eftirløn. Eftirlønarrættindi mugu verða skrásett.

Tænastumannasetanin er stirvin at arbeiða við sum stovnsleiðsla og leiðreglur mangla.

**Røkja og menna**

Tað kemur ov lítið fram, at tíðin og peningurin, sum brúkt verða til førleikamenning, fáast fleirfalt aftur í effektiviteti.

Tað kann vera trupult at finna peningin til førleikamenning. Onkur stovnur setur av fasta upphædd, aðrir finna pening við at bíða eitt sindur, tá ið nýtt fólk skal verða sett ella at fáa inntøkur, hava teir inntøkufíggjað virksemi.

Forum fyri t.d. leiðslum og fíggjarleiðarum varð eftirlýst. Meiri skipað netverk fyri ymiskar fakbólkar og uppgávubólkar, har tað eru fastir karmar og innliman, vórðu eisini eftirlýst. Vit læra ov lítið av royndunum hjá hvør øðrum

Gott hevði verið við felags førleikamenningartiltøkum um t.d. leiðslu, námsfrøði og reingerð (umhvørvi, fysikk o.l.)

Ein HR-skipan, at skrásett førleika, sjúku, frítíð og líknandi í, kundi sum amboð lætt nógv um í dagliga leiðsluarbeiðinum. Eisini hevði verið gott við skipaðum leiðslukanningum.

**Útvega sær fólk**

Tað er trupult at fáa fatur á fólki, at seta nóg nógv fólk við og at varðveita starvsfólk. Á summum økjum er ringt at fáa leiðarar. Talan er serliga um heilsufólk, pedagogar og partvíst lærarar í fólkaskúlanum.

Arbeiðsmarknaðargreiningar vórðu eftirlýstar.

**Viðmerkingar sum heild**

Tá ið biðið verður um ráð og vegleiðing er neyðugt, at tað eru fá lið at fara um og at tað eru væl skikkað fólk at spyrja. Fólkini skulu eisini vera løtt at fáa fatur á. Tað hevur ikki so stóran týdning, hvar ráðgevingin er. Týdningarmiklari er, at hon er væl skikkað.

Talan skal vera um vegleiðing frá felags lønar- og starvsfólkafyrisitingini, heldur enn góðkenning.

Barnsburður er tungur at umsita og tað kemur meiri enn so fyri, at stovnar gloyma at fáa peningin aftur.

Stórir stovnar siga seg eisini sakna fólk við HR-útbúgving.

## 6.2 Løgtingsins Umboðsmaður

Tey málini, Løgtingsins Umboðsmaður fær at viðgera, benda á, at grundleggjandi vitan og fastar mannagongdir mangla.

Leiðsluførleikin er ikki góður, grundstøðið er ov vánaligt, leiðslurnar eru ov veikar og tær taka ov ofta avgerð í panikki. Førleikin á Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum er eisini ov vánaligur.

Stovnsleiðslur leita sær hjálp hjá sakførarum, men tað hevur víst seg, at tann ráðgevingin ikki altíð hevur verið nøktandi.

Onkuntíð hevur skeivur myndugleiki tikið avgerð í starvsfólkamálum. Tað er eftir øllum at døma, tí ógreitt er, hvør setanarmyndugleikin er.

Neyðugt er, at førleiki er í almennu fyrisitingini at skúla stovnsleiðslur og at vegleiða og ráðgeva teimum. Samstundis skulu tær vera greiðar um, at øll mál eru ymisk.